# Gísmundur farin aftur til Gíslands

**Ein kend útvarpsrødd er tagnað. Gísmundur er lagdur á hillina og ætlanin er ikki at taka hann framaftur í bræði. Hann var annars eitt rimmar stjørnuskot, tá hann fyrstu ferð trein fram á pallin á sumri í 1999**

BARNAÚTVARP
*Stefan í Skorini*

Síðst í november var Gísmundur fyri seinastu ferð at hoyra í Útvarpi Føroya. Síðani legði hann leiðina aftur til Gíslands.

Gísmundur dróg nógvar lurtarar at sær, og tað vóru ikki bara børn, sum dámdu væl at hoyra snjøllu røddina hjá Gísmundi. Eisini vaksnum dámdu væl at lurta eftir barnaútvarpinum, tá Gísmundur var á skránni tvær ferðir um vikuna í fjør.

– Eg haldi, at sendingarnar við Gísmundi vórðu nakað deyðar nú móti endanum. Tað var neyðugt at finna uppá okkurt nýtt, um tað skuldi halda fram, sigur Katrin Nolsøe Joensen, sum skipar fyri barnaútvarpinum í ÚF.

– Eg vil ikki siga, at Gísmundur er deyður, men hann er fyribils lagdur á hillina í óavmarkaða tíð. Eg vil ikki útiloka, at hann kann brúkast aftur einaferð seinni.

Tað vóru Jonna og Katrin, sum fingu hugskotið viðGísmundi, og Kári Sólstein eigur røddina hjá Gísmundi.

– Sendingarnar við Gísmundi vóru sera væleydnaðar, og tað hevur verið vert eina roynd. Tað er eisini ringt at halda lív í slíkum sendingum í longri tíð, tí lurtararnir krevja meira ella okkurt nýtt, sigur Katrin.

Nú mugu lurtararnir tískil venja seg við, at Gísmundur ikki verður at hoyra aftur.



*Gísmundur verður ikki aftur at hoyra í barnaútvarpinum. Fyri góðum mánaða síðan var hann fyri síðstu ferð at hoyra, og hann verður ikki tikin framaftur í bræði. Hann var annars væl dámdur av børnum og vaksnum, tá hann kom fram*

*AGIP Faroe Branch er deild av italska orkufelagnum Eni, ið er eitt av heimsins størstu. Eni virkar í meira enn 70 londum og hevur um 75.000 fólk í starvi. Eni er virkið innan allar síður av oljuvinnuni sum t.d. olju og natúrgass, petrokemi, tænastur til oljuøki og verkfrøði.*
*AGIP hevur sum operatørur fingið tillutað tvey leitiloyvi á Føroyaøkinum. Sum liður í hesum virksemi leggur fyritøkan dent á at byggja upp førleikan og tøkniliga kunnleikan hjá føroyskum virkjum og stovnum.*

Ein heppin hond - og AGIP.



Fyri at kunna lúka krøvini í leitiloyvunum um føroyska luttøku verður við hesum søkt eftir einum oljuvinnuráðgeva til AGIP Faroe Branch-skrivstovuna í Havn.

Starvsøki oljuvinnuráðgevans verður fyri AGIP at seta í verk og umsita konsulent- og ráðgevingarvirksemi fyri føroysk virki og stovnar við tí endamáli at menna innanhýsis tøkniligar og umsitingarligar førleikar, soleiðis at tey verða betur før fyri at samarbeiða við AGIP og luttaka í oljuvinnuni annars.
Harafturat hevur oljuvinnuráðgevin ymsar innanhýsis skrivara- og umboðsuppgávur og hevur hann eisini sambandið við samstarvsfelagar, onnur virki, myndugleikar, tænastuveitarar og onnur oljufeløg um hendi.

OLJUVINNUráðgevi

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv og hevur rætti persónurin møguleika fyri at byggja upp og ávirka innihaldið í og vavið av starvinum. AGIP bjóðar eitt starv í bæði lokalum og altjóða arbeiðsumhvørvi.

Vit ímynda okkum, at oljuvinnuráðgevin hevur breiða handilsumsitingarliga útbúgving og royndir. Viðkomandi kennir og skilir føroyskt vinnulív og oljuvinnuna og hevur gott samband við almennar stovnar og útbúgvingarstøð. Oljuvinnuráðgevin hevur eina greiða mynd av fyrimununum við føroyskari luttøku í oljuvinnuni og góð evni at læra frá sær og menna. Harumframt er oljuvinnuráðgevin teldukønur og stinnur í skrivligum og munnligum enskum.

Løn eftir avtalu.

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi skulu stílast til Inga Højgaard, tel 31 12 60 ella 31 41 18.
**Umsóknir á enskum skulu vera AGIP Faroe Branch í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. januar 2001.**

Eni GROUP
Agip Faroe Branch
Undir Bryggjubakka 1
P.O. Box 184
FO-110 Tórshavn
Tel 35 10 00 Fax 35 10 01

www • team85 • fo

# Fleiri herverk í Havn

**Síðan týsdagin hava fleiri herverk verið í høvuðsstaðnum. Eitt teirra varð framt í hevnisøku móti eigaranum av bili. Talan er tó um smávegis herverk, sum eru framd móti handli, bilum og skutara. Enn er einki nýtt at frætta frá innbrotunum, sum vóru á nýggjárinum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Persónligt agg var atvoldin til, at ein onkur føldi trongd til at gera seg inn á ein persónbil í miðbýnum í Havn í hesi vikuni.

Bilurin stóð parkeraður í miðbýnum, og hann hevur fingið nakrar skøvur og buklur av harðligu viðferðini. Løgreglan upplýsir, at tað var persónligt stríð, sum var atvoldin til herverkið.

Ein annar bilførari var heldur skakkur, tá hann kom aftur til bilin, sum stóð parkeraður á Hallarheygnum.

Har hevði onkur gjørt seg inn á bilin, sum eisini hevði fingið bæði buklur og skøvur. Løgreglan kennir ikki orsøkina til hetta herverkið.

Tað hava mest verið akfør, sum hava fingið av grovfílini seinastu dagarnar. Ein skutari, sum eisini stóð í miðbýnum, hevur eisini verið fyri herverki, sum er meldað.

Blomsturhandilin Akkuleya í Niels Finsensgøtu hevur eisini staðið fyri skotum. Hurðin í handlinum varð sparka inn, men einki innbrot hevur verið, og einki er horvið úr sjálvum handlinum, uttan rúturin í hurðini, sum reyk sær ein túr.

## Einki nýtt um innbrotini

Um vikuskiftið fekk løgreglan fráboðan um trý innbrot í Havn. Tað var í Tórshøll, har tjóvarnir fingu 7.000 krónur og sigarettir við sær, í Gamla Bókhandli hvurvu nakrar hundrað krónur og ein telefon og í barnagarðinum á Varagøtu tóku tjóvarnir eisini pening við sær.

Løgreglan hevur enn ikki handtikið nakran persón í hesum málinum, og einki nýtt er komið undan kavi. Arbeitt verður framvegis við málinum.

# Rann undan løgregluni

Hósmorgunin varð ein maður í 30-unum stevndur fyri rættin. Hann er ákærdur fyri siðamisbrot.

Løgreglan upplýsir, at hetta er eitt gamalt mál, sum av góðum grundum ikki er komið fyri í rættinum enn.

Maðurin hevur nevniliga ikki møtt upp í rættinum til ta ásettu tíðina, tá málið skuldi koma fyri. Tí hevur løgreglan verið noydd at taka mannin, sum er úr Vágunum, og noyða hann til at møta upp.

Tað hevur tíverri ikki eydnast okkum at fáa hendur á ákæruritinum.



# Fyrireika nýggjan studentaskúla

**Sløk millión er sett av á fíggjarlógini í ár til at projektera nýggjan studentaskúla í Suðuroynni. Landsstýrismaðurin í skúlamálum er farin undir fyrireikingarnar, og innan eina viku verður bygginevnd sett**

SKÚLABYGGING
*John Johannessen*

Innan trý ár kunnu studentaskúlnæmingar í Suðuroynni og lærarar teirra flyta í nýggjan skúla fyri 22 milliónir krónur.

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum, hevur gjørt av, at farast skal undir at byggja nýggjan miðnámsskúla í Suðuroynni sum skjótast. Og á fíggjarlógini fyri 2001, sum varð samtykt fyri jól, eru 800 túsund krónur settar av til at projektera skúlan.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum sigur, at fyrireikingararbeiðið er farið í gongd, og innan eina viku ætlar Tórbjørn Jacobsen sær at seta eina bygginevnd.



*Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum, ætlar, at Suðuroyingar skulu hava nýggjan studentaskúla tøkan í 2004*

## Vána umstøður

Miðnámsskúlin í Vági heldur í verandi støðu til í trimum bygningum í Vági. Størsti parturin av virkseminum fer fram í einum parti av Vágs Skúla, meðan umsitingin og tvær skúlastovur eru í sokallaða Gamla Posthúsinum, sum varð umvælt til skúlan, tá hann flutti til Vágs fyri nøkrum árum síðani. Hesin bygningurin er í góðum standi, men er kortini alt ov trongur.

Bókasavnið og uppihaldshøli hjá Miðnámsskúlanum eru í einum triðja bygningi, nevniliga í bygninginum, har býráðið fyrr helt til. Hesin bygningur er í so ringum standi, at hann stendur at rapa.

Orsakað av vánaligu umstøðunum hjá Miðnámsskúlanum í Vági og orsakað av búskaparligu ovuruppphitingini í miðstaðarøkinum, valdu landsins myndugleikar at útseta ætlanirnar um at byggja nýggjan studentaskúla í Havn, og í staðin at byggja ein nýggjan í Suðuroynni.

– Hetta var ein rein politisk avgerð. Fóru vit at byggja nýggjan skúla í Havn, hevði hetta ávirkað byggivinnuna nógv í ovurupphitaða miðstaðarøkinum. Og tað hevði helst eisini ávirkað útjaðaran negativt. Tí valdu vit at byggja nýggjan studentaskúla í Suðuroynni, sum er ein av teimum pørtunum í útjaðaranum, sum er ringast fyri, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum.

## Verður helst í Vági

Løgtingið samtykti í áttatiárunum, at nýggjur Miðnámsskúli skuldi byggjast í Hovi. Tá var stríð um, hvar ein ætlaður Miðnámsskúli skuldi vera. Vágbingar vildu hava skúlan til Vágs, meðan tvøráfólk vildu hava skúlan á Tvøroyri.

Hóast løgtingssamtyktina, varð ein fyribils skúli gjørdur í Vági, og har heldur hann til enn.

Stendur tað til Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismann í skúlamálum, verður nýggi skúlin bygdur í Vági.

– Skúlar vinna sær hevd, har teir eru. Og nú hevur Miðnámsskúlin verið í Vági í so nógv ár, at tað verður ein stór avgerð, ið skal takast, um hann skal flytast, sigur Tórbjørn Jacobsen.

– Eg vóni ikki, at tað aftur nú verður lokalt rumbul um, hvar skúlin skal vera, tí so verður ætlanin bara seinkað, ger landsstýrismaðurin greitt.

Tórbjørn Jacobsen heldur tað vera lítið sannlíkt, at skúlin verður bygdur í Hovi, eins og løgtingssamtyktin sigur. Tí verður helst neyðugt hjá landsstýrismanninum at leggja uppskot fyri tingið, um at broyta løgtingssamtyktina, sum hevur verið brotin í nógv ár.

## Skal ganga skjótt

Ætlanin er, at arbeiðið at fyrireika nýggja Miðnámsskúlan í Suðuroynni skal vera liðugt í ár. Tí hevur landsstýrið sett fýra milliónir á løguætlanina fyri 2002 til at byggja fyri. Í 2004 eru eftir ætlanini 22 milliónir brúktar uppá skúlan, og tá skal hann standa liðugur.

– Men sjálvsagt er tað ongantíð betur, enn at arbeiðið kann klárast skjótari. Men so má peningur eisini játtast til tað, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum.





*Miðnámsskúlin í Vági heldur til í trimum bygningum. Ein teirra er gamla kommunuskrivstovan, sum stendur at rapa.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kirkjuorgul aftur í Skopun



*Adventistapresturin handar Gerhard Lognberg, bygdaráðsformanni, og Elis Poulsen urguna*

Fyrsta urgan, sum stóð í Skopunnar Kirkju, hevur ferðast víða og nú er tað aftur í Skopun. Hósdagin fór tað aftur um fjørðin og í framtíðini fer tað antin at standa í kirkjuni ella á bygdasavninum.

Søgan er hendan. Skopunnar Kirkja verður bygd í tíðarskeiðnum 1895-97. Meginparturin av tilfarinum stavar frá gomlu kirkjuni í Vestmanna. Vestmenningar fingu um hetta mundi eisini nýggja kirkju. Við tilfarinum fylgdi eisini urgan.

Ein ung genta í Skopun, Karin Lukasen, seinni gift Reinert var nom og lærdi skjótt at spæla upp urguna. Hon gjørdist fyrsti veruligi organisturin í Skopun. Tá kirkjan fekk nýggja urgu fekk Karin gomlu. Karin flutti til havnar og urgan við. Tá Karin doyði fekk dótturin Bodil Poulsen urguna. Hon hevur staðið í heimi hennara til Bodil doyði í fjør. Hon hevði testamenterað sínar ognir til Adventistakirkjuna og hendan kirkjan hevur givið skopunningum urguna aftur.

Elis Poulsen hevur verið ein av monnum aftanfyri at fáa urguna aftur til bygdina. Hann veit ikki enn hvar urgan kemur at standa. Kanska í kirkjuni, men kirkjuráðið hevur ikki tikið støðu til hetta enn. Í løtuni stendur urgan á kommunuskrivstovun i og ein møguleiki er eisini at seta hana í bygdasavni, men tað verður ikki enn, tí har eru umstøðurnar ov vánaligar.